# Diamantbrúðarparið Marianna og Vilhelm Nielsen í Sandavági



**Í dag, fríggjadagin 12. apríl, hava hjúnini Marianna og Vilhelm Nielsen í Sandavági diamantbrúdleyp.**

Bæði eru tey væl kend millum manna í Føroyum. Saman hava tey í meira enn eitt mannaminni rikið skinnvirkið Vilmu, og nógvir eru teir útlendingar, sum hesi árini hava leitað inn í handilin í Havn at keypa okkurt forkunnugt heim aftur við sær.

Í góðum práti í handlinum hevur Marianna vunnið sær nógvar vinir víða um lond, og nógvar munnu heilsanirnar vera, sum eru leitaðar aftur til hennara í handlinum frá nøgdum viðskiftafólki.

Umframt hetta dagliga livibreyðið, hava tey verið virkin á so nógvum økjum.

Í langt áramál var Vilhelm tingmaður fyri Fólkaflokkin í Vágum. Hann mundi vera tann fyrsti, sum setti navn á fast samband um sundið, so fólk í Vágunum kundi fáa høvi at virka undir somu treytum sum tey, ið hann plagar at kalla "á meginlandinum".

Áhaldandi helt hann fram at minna á hesa týdningarmiklu útbygging av føroyska samfelagnum, og nú er hol á. Hann fylgir væl við gongdini í arbeiðinum við Vágatunlinum, og alt, undirsjóvartunlinum viðvíkjandi, verður klipt út úr føroysku bløðunum og tikið fram við jøvnum millumbilum. Hann gleðir seg at liva tann dag, tá ið tunnilin verður tikin í nýtslu til almenna ferðslu.

Tey giftust sum heimsbardagin leikaði upp á tað harðasta, og vanligar gerandisvørur ikki longur vóru at fáa hendur á.

Livibreyðið tá var tí ein pylsuverksmiðja, sum nøktaði tørvin á pylsum til føroyska marknaðin. Kjøtmaskinan varð rikin við einum gomlum motorsúkklumotori.

Eftir kríggið høvdu tey handil við m.ø. skóm og elútgerð, og eisini skósmiðju. Tuflur og gaggur vórðu sendar um alt landið.

Vilhelm hevur eisini verið til skips og starvast sum arbeiðsformaður í fiskavirkinum hjá bróðurinum Zachariasi Nielsen. Hann hevur eisini róð út, ikki minst við kalvalínu, og sum hjá flest øllum á bygd, var kúgv í húsinum. Uttan um húsini var leingi ein sera vakur urtagarður við fjøld av blómum, og trøini, sum tey bæði í síni tíð settu niður, eru nú eina størstu og vakrastu trøini í allari bygdini.

Í langt áramál røkti Vilhelm starvið sum deknur í kirkjuni í Sandavági, sum hann tók á seg eftir faðir sín. Saman høvdu Vilhelm og Marianna sunnudagsskúla í Meinigheitshúsinum, og tey hava til ellisár verið virkin í arbeiðinum í Meinigheitshúsinum yvirhøvur, eins og í nevndararbeiði innan kirkju og heimamissión. Bróðurkretsurin á havninum, sjómansmissiónin og ytra missión hava staðið hjarta teirra nær, og mong eru tey fólk, bæði í tílíkum og í øðrum ørindum, sum hava sitið væl inni hjá teimum báðum, Vilhelmi og Marionnu.

Marianna er fødd og uppvaksin í Nesinum beint yvir av Vestmanna og kom til Sandavágs at tæna hjá Dánjal Peturi og Onnu Sofíu, sum høvdu posthúsið og telefonstøðina Vilhelm er yngsti sonur teirra.

Marianna og Vilhelm giftust 12. apríl í 1942 og fluttu inn í nýbygdu húsini miðskeiðis millum Sandar og Steig.

Tey eiga børnini Paula, Sólgerð, Sofus og Ann. Ommu- og abbabørnini eru 16 í tali, og langommu- og langabbabørnini eru 7.

Tey, sum vilja hitta Vilhelm og Marionnu á hátíðardegnum, kunnu hitta tey í Meinigheitshúsinum millum kl. 18 og 21.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
og sum fylgdu kæri konu míni og mammu,
ommu og langommu okkara

**Jóhonnu Johannesen**
Vestmanna (áður Joensen í Klaksvík)

til hennara seinasta hvíldarstað her á jørð.

Eina serliga tøkk veita vit starvsfólkinum á B8
fyri góða umsorgan, tykkum, sum tóku ímóti henni
og fylgdu henni úr heiminum í Vestmanna
og vestmannadekni fyri andaktina í heiminum.

Somuleiðis takka vit klaksvíkspresti, dekni,
klokkara, urguleikara, gravarum, berarum
og sangarum og norðoyingum annars
fyri ta virðiligu jarðarferðina úr Christianskirkjuni,
so sum hon sjálv hevði ynskti.

Takk fyri blómur, kransar og aðrar samkensluheilsanir.

*Fyri tey avvarðandi*

**Frits**

**Regin, Eyðun, Mikkjal og Ruth**


# Lønarhækkan

**Gjaldstovan**
**Formlig viðurskifti**
**Roknskapur**
**Vegleiðingar**
**Verkætlanir**
**Tíðindi**

LØNARHÆKKAN
*Tíðindaskriv*

1. mars hækkaðu flestu lønirnar hjá tí almenna samb. tær semjur, ið gjørdar eru við ymsu feløgini og Fíggjarmálastýrið.

Gjaldstovan hevur tann 1. mars skrásett nýggju talvurnar hjá ávikavist hesum feløgum:

- Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
- Føroya Byggifrøðingafelag
- Føroya Lærarafelag
- Føroya Pedagogfelag

Nýggir flokkar og stig – eftirlønin hjá sáttm. pedagogum er nú 12% arb. gev. partur - hjá hjálparfólkum óbroytt 8%

- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Føroya Verkfrøðingafelag
- Magistarafelag Føroya
- Felagið Maskinskúla- og Sjómansskúlalærara
- Starvsmannafelagið

Í mars er gjaldið í eftirlønargrunn býtt soleiðis: 6,5% til privata uppsparingin og 1% til eftirlønargrunn

Frá apríl verður gjaldið 5,5% til privatu uppsparingina og 2% til eftirlønargrunn.

Tænastumannalíknandi sett:

- Læraraeftirlønir

Eftirgjald fyri februar - galdandi fyri føroyskar eftirlønir.

Í februar hækkaði lønin hjá frammanundan løntum:

- Tænastumannafelag
- Landsins
- Løgmaður og Landsstýrismenn
- Løgtingsmenn
- Tænastumannaeftirlønir
- Tænastumannasettir lærarar
- Tænastumannasettir pedagogar



# Gongur framá við Norrønu



SKIPASMÍÐ

Ein byrjar at síggja, at talan er um eitt risaskip. Nógv umtalaða Norrøna tekur nú so smátt skap niðri í Týsklandi. Eftir ætlanini skal hon sjósetast longu í august mánaða í ár, og síðst vit fréttu av Smyril Line varð henda tíðarætlan hildin. Jomfrútúrurin verður so ikki fyrr enn næsta ár, men tað kunnu vit bara gleða okkum til.

**-ib**

# Dani fekk 8 mánaðir

**Ein 30 ára gamal dani úr Keypmannahavn var hósmorgunin dømdur átta mánaða fongsulsrevsing fyri vera við til at smugla eitt kilo av hassji og umleið 40 gramm av kokaini til Føroyar**

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur viðgjørdi allan mikudagin á tamb enn eitt mál í stóra narkomálinum, sum hevur verið í hæddini síðan 16. januar.

Ein 30 ára gamal dani var hesuferð funnin sekur í at hava hjálpt til at smugla rúsevni til Føroyar. Dómarin fann haldgóð prógv fyri, at maðurin hevði veitt eitt kilo av hassji og umleið 40 gramm av kokaini til føroyska marknaðin, hóast hann sjálvur ikki hevði smuglað rúsevnini til Føroyar. Hann hevði givið einum smuglara tey í Keypmannahavn.

Umframt at skula sita átta mánaðir í fongsli varð hald lagt á 10.000 krónur, sum var vinningur fyri søluna, og 40 gramm av hassji, sum varð funnið í bústaðinum hjá manninum í Keypmannahavn, tá hann varð handtikin. Eisini skal hann rinda sakarmálskostnaðin. Ákæruvaldið vildi hinvegin vera við, at hann hevði fingið 22.500 krónur í vinningi og kravdi upprunaliga tíggju mánaða fongsling.

Tvey vitni vóru í rættinum henda dagin. Annað vitnið hevur longu fingið eitt ára fongsulsrevsing í narkomálinum, meðan hitt vitni framvegis situr varðhaldsfongslað og bíðar eftir dómsviðgerðini.

Maðurin noktaði seg sekan í at hava veitt einum smuglara eitt kilo av hassji, men hann játtaði hinvegin at hava veitt umleið 40 gramm av kokaini.

Rætturin tók frágreiðingina hjá øðrum vitninum, sum greiddi frá, at hann hevði fingið ein pakka við einum kilo av hassji frá tí ákærda, til eftirtektar.

Av tí at henda frágreiðingin ikki var nágreinilig á øllum økjum, gav dómarin tí ákærda eina linari revsing. Óvissan um mongdirnar kom í hesum førinum tí ákærda til góðar.

Dómarin segði í úrskurðinum, at danin fær seks mánaðir fyri kokaini og tveir mánaðir fyri hassjið. Dømt varð eftir føroyskari mannagongd, har lógarbrot við rúsevnum verða dømd harðari enn í Danmark, hóast lógarbrotini eru framd í Keypmannahavn, tí maðurin visti, hvar rúsevnini skuldu. Orsøkin er, at vinningurin av søluni er størri í Føroyum, og tí at føroyska samfelagið er meira viðbrekið.

Eisini fekk ákærdi linari revsing, tí hann hevur sitið avbyrgdur í varðhaldinum síðan 16. januar. Tíðin í varðhaldinum verður drigin frá samlaðu revsingini.

Maðurin vildi vera við, at hann ikki hevði nakran stórvegis leiklut í smuglingini av rúsevnum til Føroyar. Hesum vísti dómarin frá sær, tí hann helt, at avlurtingar av telefonsamrøðum millum tann 30 ára gamla danan og ein seljara í Føroyum, greitt vístu, at hann hevði verið við til at skipa fyri smugling av rúsevnum. Hesar avlurtingar vórðu spældar í rættinum.

Maðurin fer at umhugsa, um hann tekur við dóminum, og hann er nú leyslatin.





BOÐ TÆNASTAN

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum